# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 23.09.2024 kl. 17.00

Á fundi: Janus Thomsen
Ronni Hammer
Niels Olaf Eyvindsson
Martin í Nesi
Eir J. Norðberg
Thorstein Thomsen
Poul Laust Christiansen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt innkomið mál við – játtað og kemur á skrá sum mál nr. 4.

1. **102-35-2024: Umsókn um byggiloyvi til víðkan av bilhúsi matr. nr. 19e, Hvalba.**

   Søkt verður um loyvi til at víðka um verandi bilhús.

   **Tekniska nevnd 20.09.2024:**

   Nevndin mælir til at fylgja tilmælinum hjá byggimálsviðgeranum og geva frávik.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi og frávik í hesum sambandi sambært umsókn, givnum upplýsingum og tekningum, treytað av, at byggingin verður framd í fullum samsvari við hjálagda byggiloyvi og treytum annars.

2. **102-36-2024: Sáttmálin um skúlabarnaflutning.**

   Verandi sáttmáli um skúlabarnaflutning til svimjing og breytir gekk út tann 01.08.2024. Til viðgerðar uppskot til 3 ára sáttmála, galdandi frá 01.08.2024 til 31.07.2027 við óbroyttum gjaldi.

   **Trivnaðarnevndin 17.09.2024:**

   Einmælt samtykt at mæla til at undiskriva sáttmálan.

   **Fíggjarnevndin 23.09.2024:**

   Samtykt varð einmælt at mæla til at taka undir við uppskotinum um 3 ára sáttmála.

   **Avgerð:**

   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

3. **102-41-2024: Vegurin oman á Støð í Nesi – tilboð uppá asfalt.**

   Skriv viðvíkjandi vegnum oman á Støð í Nesi, ið er í sera ringum standi.

   Tilboð frá HJ Asfalt fyri klárgering/asfaltering.

**Vega- og havnanevndin 20.09.2024:**
Nevndin mælir til at gera hetta arbeiði við 2 x 40 mm asfalt + garð og uppfylling ímóti múrinun.
**Fíggjarnevndin 23.09.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum 1 x 50 mm asfalt og at stoypa garð vestanfyri Dímunarneystið.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Harumframt varð einmælt samtykt at taka av tilboðnum frá HJ Asfalt uppá asfalt á vegamótið Bíarvegur/Norðbergsvegur, vegin oman á Hamranes og kaðalgrøv á Hamranesi.

4. **102-37-2024: Tilboð uppá grótlaðing í Garðsenni frá Andrias Olsen Fa.**
Tilboð uppá at laða garð í Garðsenni – talan er bert um arbeiðsløn.
**Vega- og havnanevndin 20.09.2024:**
Nevndin mælir til ikki at taka av fyriliggjandi tilboði, tí her eru ov nógvir ókendir prísir í.
**Fíggjarnevndin 23.09.2024:**
Samtykt varð einmælt at mæla til at taka av tilboðnum frá Andrias Olsen Fa.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at beina málið aftur í Vega- og havnanevndina.

5. **Ikki alment mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 18.15

Janus Thomsen Ronni Hammer Niels Olaf Eyvindsson

Martin í Nesi Eir J. Norðberg Thorstein Thomsen Poul Laust Christiansen